## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og vestri og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Lot til andøvsgul av útnyrðingi og vestri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Fleyr til gul av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 13 og 16 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Fleyr til gul av ymsum ættum, sunnudagin upp í stívt andøvsgul av landsynningi. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 12 og 16 stig.

# El & Tele røkir alt landið av Argjaboða

NÝGGJUR BÚSTAÐUR
Jan Müller

Í besta sólskinsveðri kundu tey 12 starvsfólkini í fyritøkuni El & Tele fríggjadagin í farnu viku taka ímóti viðskiftafólki, ið høvdu leitað sær út á Argjaboða til almennu móttøkuna. Fyritøkan El & Tele, sum hevur húsast í Havn, er nú flutt í størri og arbeiðsligari høli í útjaðaranum av høvuðsstaðnum. Hetta heldur Rasmus Magnussen, stjóri ikki vera nakran trupulleika. Hølini liggja sera væl fyri og í sera vøkrum umhvørvi. Har eru góðar umstøður at taka ímóti viðskiftafólki og skjótt er eisini at koma út til kundarnar, ikki bert í Havnini men kring alt landið, nú nýggi ringvegurin er um at verða liðugur.

Tað eru Rasmus Magnussen og Eyðun Egholm, sum standa á odda fyri El & Tele, ið hevur lagt seg eftir at vera ein av teimum førandi fyritøkunum í landinum innan el-, edv- og telekervi. Rasmus Magnussen sigur, at teir hava lagt seg eftir at kunna veita kundum sínum eina heildarloysn. Tað skal vera óneyðugt hjá kundanum at leita sær fleiri staðni fyri at kunna fáa tær tænastur hann hevur brúk fyri á el- og teleøkinum.

Teir leggja m.a. stóran dent á at kunna veita eina góða og holla ráðgeving, nakað, sum í longdini roynist best fyri bæði veitarara og kunda. Á tann hátt tryggjar tú tær sum kundi, at ikki óneyðugar íløgur verða gjørdar ella at óneyðug orka verður nýtt.

– Vónandi verða vit uppaftur betri førir fyri at liva upp til hesi krøv í nýggju hølunum sigur Rasmus Magnussen, sum leggur dent á, at tey á virkinum leggja seg eftir at veita eina professionella tænastu. Tað ber í sær, at starvsfólkini alla tíðina verða dagførd á skeiðum, seminarum og ymsum útbúgvingum. Hann heldur tað eisini hava stóran týdning fyri fyritøkuna og góðskuna á teimum vørum og tænastum teir lata, at El & Tele er Ascom umboð í Føroyum.

Í stóra og snotuliga bygninginum yðst á Argjaboða, ið upprunaliga varð bygdur sum bústaður og verkstaður hjá eini aðrari elfyritøkuni, hjá Palla á Dul, eru eisini fleiri aðrir leigarar. Her húsast m.a. SNG og eitt laksavirki.




*Starvsfólkini hjá El & Tele, sum nú bjóða øllum landinum sínar vørur og tænastur í nýggju hølunum á Argjaboða* *Mynd Jan Müller*



*Rasmus Magnussen, stjóri saman við konuni og dótturini.*
*Mynd Jan Müller*

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 9 |
| Nuuk | 4 |
| Qaqortoq | 3 |
| Ammassalik | 7 |
| Saint John's | 19 |
| Halifax | 16 |
| Reykjavík | 10 |
| Seyðisfjørður | 7 |
| Tórshavn | 8 |
| Lerwick | 10 |
| Aberdeen | 11 |
| London | 15 |
| Tromsø | 8 |
| Bergen | 18 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 16 |
| Keypmannah. | 19 |
| Helsinki | 14 |
| Moskva | 26 |
| Berlin | 18 |
| Warzawa | 18 |
| Kiev | 23 |
| Bukarest | 17 |
| Paris | 16 |
| Madrid | 23 |
| Róm | – |
| Malorca | – |
| Athen | 26 |
| Malta | 25 |
| Tunis | 26 |
| Beijing | 30 |
| New Dehli | 33 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | 17 |
| New York | 27 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 20 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | 28 |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 9 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Lágtrýstið yvir Íslandi fer í landnyrðing og brúgvalagið haðani til Føroya fer eystureftir.




Hátrýstið í útsynning úr Føroyum fer um Føroyar fríggjadagin.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 18/06 kl. 06⁰⁰–19/06 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 8,1°
Minsti hiti máldur í juni 0,0° Mesti hiti máldur í juni: 20,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 8,0 mm – mált frá 18/06 kl. 06⁰⁰–19/06 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í juni: 24,2 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

11. juni: Mánin longst frá jørðini
14. juni: Seinna kvarter
21. juni: Tendring
23. juni: Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2001

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 20. juni | 06.16 | 18.40 | 05.16 | 17.40 | 05.31 | 17.55 | 08.16 | 20.40 | 09.16 | 21.40 | 04.31 | 16.55 | 03.31 | 15.55 | 06.31 | 18.55 | 07.31 | 19.55 | 06.01 | 18.25 | 07.16 | 19.40 |
| 21. juni | 07.07 | 19.34 | 06.07 | 18.34 | 06.22 | 18.49 | 09.07 | 21.34 | 10.07 | 22.34 | 05.22 | 17.49 | 04.22 | 16.49 | 07.22 | 19.49 | 08.22 | 20.49 | 06.52 | 19.19 | 08.07 | 20.34 |
| 22. juni | 08.02 | 20.30 | 07.02 | 19.30 | 07.17 | 19.45 | 10.02 | 22.30 | 11.02 | 23.30 | 06.17 | 18.45 | 05.17 | 17.45 | 08.17 | 20.45 | 09.17 | 21.45 | 07.47 | 20.15 | 09.02 | 21.30 |
| 23. juni | 08.58 | 21.27 | 07.58 | 20.27 | 08.13 | 20.42 | 10.58 | 23.27 | 11.58 | — | 07.13 | 19.42 | 06.13 | 18.42 | 09.13 | 21.42 | 10.13 | 22.42 | 08.43 | 21.12 | 09.58 | 22.27 |